

– Hetta er fjórðu ferð, at vit eru á bátaferð í Noregi. Fyrstu ferð vóru vit í 14 dagar, aðru ferð í tríggjar vikur, síðan í fýra vikur, og hesaferð vera vit í tríggjar vikur. Vit plaga at hava onkran við okkum í bátinum, men hesaferð eru vit fyri fyrstu ferð einsamøll, sigur Margit Glerfoss

Mynd: Vilmund Jacobsen




Báturin varð flotaður sum eitt vanligt áttamannafar í 1981, men í 1992 tók Kristian bátin upp á land aftur til umbyggingar

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Á høkjum á

**Tað liggur í blóðinum hjá Kristiani Glerfoss at duga væl til hendurnar. Pápin var kendur bátasmiðjur í Mikladali. Í hesum døgum eru Kristian og konan, Margit, saman við øðrum føroyingum á bátaferð í Noregi. Hetta er fjórðu ferð, at tey bæði ferðast í báti í norska skergarðinum. Kristian hevur sjálvur bygt bátin við forvitnisliga navninum, Meranti. Tey nærkast bæði pensjónsaldri, og nú tey saman fóru á hesa ferð, var Margit á høkjum, tí hon nýliga hevur skift knæ. Men hetta helt henni ikki aftur**

BÁTAFERÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Eg haldi, at hetta er fyrstu ferð, eg havi verið í Bergen, at sólin hevur skinið. Oftast hevur verið regn, grátt og keðiligt veður. Tað er neyvan av ongum, at býurin hevur verið róptur "paraplyernes by". Men í dag er veðrið so avbera gott.

Á bryggjuni í Bergen týsdagin hitti Sosialurin Margit Glerfoss, sum saman við manninum, Kristiani Glerfoss, og fleiri øðrum føroyingum eru komin til Noregs á bátaferð.

## Bátar og farmur

Norrøna hevur júst lagt til bryggju og nógv ferðafólk, sum eru komin úr Føroyum umvegis Hetland, eru farin ein túr í býin.

Summi hava í hyggju at keypa sær okkurt, og onnur eru farin at hyggja seg um teir tveir tímarnar, tey hava høvi at vera í landi, áðrenn skipið loysir aftur.

Vit velja at vera verandi á bryggjuni saman við bátafólki, sum bíða eftir, at teir 24 bátarnir á vognum verða sleipaðir úr Norrønu og sjósettir.

– Vanliga plaga allir bátarnir at verða flotaðir, áðrenn Norrøna loysir aftur, sigur onkur, sum áður hevur verið í Noregi á bátaferð.

Men farmurin er nógvur, og tað tekur sína tíð at fáa bátarnar í land.

Enn er heldur eingin krani komin oman á bryggjuna.

Tá ið Norrøna loysir aftur einar tríggjar tímar eftir komuna, er eingin bátur flotaður, men nakrir eru komnir at standa fram við bryggjukantinum.

## Maður og kona

– Hetta er fjórðu ferð, at vit eru á bátaferð í Noregi. Fyrstu ferð vóru vit í 14 dagar, aðru ferð í tríggjar vikur, síðan í fýra vikur, og hesaferð vera vit í tríggjar vikur. Vit plaga at hava onkran við okkum í bátinum, sum hevur fýra sovipláss, men hesaferð eru vit fyri fyrstu ferð einsamøll.

Margit, sum vit práta við á bryggjuni í Bergen, er 65 ára gomul. Hon hevur skift annað knæið, og hevur høkjurnar við sær.

– Eg skifti knæ síðst í mars, og eg haldi, at tað gongur bara væl. Tað verður kanska eitt sindur stríggið at sleppa niður í bátin, tí bryggjan er so høg. Aðrastaðni, har vit plaga at koma, eru bátabrúgvar, og tá fer at liggja betur fyri at sleppa í og úr bátinum.

Margit sigur, at knøini vóru vorðin so vánalig, at hon at enda ikki fekk gingið.

– Tað er langt síðan, at eg fekk staðfest slitgikt. Tá ið tíðin kemur, ætli eg mær at skifta hitt knæið eisini, sigur hon.

## Góðir túrar

Margit sigur, at hon og maðurin hava verið ógvuliga glað fyri túrarnar í Noregi, sum hava verið nakað heilt fyri seg.

– Hetta hava verið túrar, sum hava fest seg í minnið fyri lívið. Vit sigla innanskers millum smáu plássini, og siglt verður bert um dagin. Um kvøldið hugna vit okkum saman. Vit matgera í bátinum, og er veðrið gott, verður grillin tendrað - og viðhvørt eru vit á plássum, har felagsgrill er. Fólk, sum vit hitta á leiðini, eru blíð og fyrikomandi, og tað er ikki so sjáldan, at tey eru við í hugnanum um kvøldarnar.

Okkurt postkortið er eisini farið ímillum londini eftir hesar ferðir.

Hon sigur, at onkuntíð hava bátafólkini skipað fyri føroyskum kvøldum í felagshúsum, sum eru í bygdunum.

– Her hava vit havt føroyskan mat, og vit hava sungið afturvið hugnaligum